# Fyribyrgingarráðið www.fyribyrg.fo

**Spurnarkapping**

*Børn, sum eru passivir roykjarar, eru í vanda fyri at fáa:*
A) Millumoyrnabruna
B) Bronkitis
C) Fleiri og ógvisligari astmatilburðir
D) Øll omanfyrinevndu

**Svar D: Óvirkin royking er ein álvarsom hóttan móti heilsuni hjá børnum.**

Pinku- og smábørn hjá roykjarum kenna tær mest álvarsomu fylgjurnar av óbeinleiðis royki. Hesi børn eru í øktum vanda fyri sjúkum í andaleiðini til dømis lungabruna og bronkitis. Børn, sum anda óbeinleiðis royk í seg, eru eisini í størri vanda fyri at fáa niðursetta lungafunktión og ertan í andaleiðini, til dømis hosta, slím og trongd. Óvirkin royking kann eisini føra við sær, at væta verður savnað í miðoyranum, og er hetta tann mest vanliga orsøkin til, at børn verða skurðviðgjørd. Børn, sum hava astma eru í serligum vanda. Óbeinleiðis roykur er orsøk til, at børn, ið hava astma, fáa fleiri og meira álvarsamar astmatilburðir, og børn, ið hava astma, verða meira asmatisk orsakað av óbeinleiðis royki.

*Um tú roykir 10 sigarettir um dagin, hvussu nógvar krónur fert so at brúka til sigarettir komandi 10 árini? (35 kr. / 20 sigarettir)*
A) 1.500 kr.
B) 5.700 kr.
C) 30.000 kr.
D) 64.000 kr.

**Svar D: Um tú roykir 10 sigarettir um dagin, fert tú at brúka 64.000 kr. til sigarettir komandi 10 árini. [1,75 kr./stk. x 10 x 365 x 10]**

*Um tú setir peningin, sum 10 sigarettir kosta, í bankan hvønn dag í 10 ár við eini rentu uppá 2,25%, hvussu nógvan pening hevur tú spart?*
A) 8.000 kr.
B) 15.000 kr.
C) 35.000 kr.
D) 70.000 kr.

**Svar D: Um tú setir tað, sum 10 sigarettir kosta í bankan hvønn dag við einari rentu uppá 2,25% (ungdómsrenta), eigur tú 70.000 kr. eftir 10 árum.**

*Roykfrítt umhvørvi á arbeiðsplássinum hevur við sær:*
*A) At tey, ið ikki roykja, anda minni av passivum royki í seg*
B) At roykjarar roykja minni
C) At fleiri leggja av at roykja
D) At børn anda minni av passivum royki í seg
E) Øll omanfyrinevndu

**Svar E: Roykfrítt umhvørvi á arbeiðsplássinum hevur við sær, at tey, ið ikki roykja anda minni av passivum royki í seg, at roykjarar roykja minni, at fleiri leggja av at roykja, og at børn anda minni av passivum royki í seg.**

*Hvussu leingi skal ein ungur roykja, aðrenn hann vísir eyðkenni til at verða bundin av tubbak:*
A) Nakrar fáar vikur
B) Fleiri mánaðar
C) Fleiri ár

**Svar A: Tað vísir seg í eini kanning, at tey ungu, sum sýna eyðkenni til trongd eftir tubbakki fáar vikur eftir, at tey eru byrjað at roykja, eru reglan heldur enn undantakið.**

*Keldu: Kanningin er kunngjørd í apríl 2002 í Archives of Pediatrics & Adolescent Medicine.*

# Íslendska kallakórið Jøkull til Føroya

SANGVITJAN
*Tíðindaskriv*



Íslendska kallakórið Jøkull av Hornafjørðinum, ið telur 43 mans, kemur á sangvitjan frá leygadegnum 17. mai til og við hósdagin 22. mai.

Kallakórið Jøkul var stovnað á bóndafundi, sum varð hildin í Austur-Skaftafellssýslu í 1972.

Sigurjón Bjarnason stjórnaði kórinum frá fyrsta degi 4. januar í 1972 til hann legði frá sær í 1992. Síðani hevur Jóhann Morávek verið kórleiðari, meðan Guðlaug Hestnes hevur syrgt fyri undirspælinum á klaver.

Kallakórið Jøkul hevur ferðast víða, teir hava hildið konsert í øllum norðurlondunum og í Italiu. Kallakórið hevur eisini hildið konsertir saman við íslendska synfoniorkestrinum.

Í 1999 gav mannskórið eina fløgu út í ber heitið »Í jøklana skjóli«.

Nógvir av limunum hava havt samband við føroyingar, tá teir hava vitjað á Hornafjørðinum, har teir flestu kórlimirnir búgva.

Sunnudagin 18. mai syngur kallakórið Jøkul við guðstænastuna í Vesturkirkjuni. Kl. 20:00 sama kvøld hevur mannskórið sína fyrstu konsert á Føroyavitjanini í Vesturkirkjuni.

Næsta konsertin hjá kallakórinum verður í Fuglafirði týsdagin 20. mai kl 20:00. Mikudagin verður farið til Suðuroyar við kórinum har seinasta konsertin verður hildin.

Kallakórið Jøkull ferð heim aftur við leigu-flogfarið til Hornafjarðar í Íslandi hósdagin 22. mai.

# Klovnur og ballónir í SMS

**Hósdagin ímillum kl. 15.00-18.00 vitjar klovnurin »Nina« í SMS, har hon m. a. fer at gera ballónskapilsir til børnini**

KLOVNUR
*Tíðindaskriv*

Hósdagin fær SMS vitjan av danska klovninum »Ninu«. Hon fer at ganga runt í SMS frá kl. 15.00 til 18.00 og gera ballónskapilsir til børnini. Nina sigur, at hon dugir annað enn at gera ballónskapilsir.

– Eg dugi eisini at ganda, og tað kann verða, at eg fari at vísa børnunum og teimum vaksnu okkurt gandakynstur hósdagin, sigur Nina.

– Um nógv børn koma í SMS hósdagin, taki eg heilt víst gandakuffertið við, leggur hon afturat.

Tí vónar SMS at mong børn og vaksin støkka inn á gólvið hósdagin, soleiðis at Nina eisini sleppur at vísa nøkur gandakynstur.



# Nýtt innan hárfríðkan á skránni í Suðuroynni

**Týsdagin vóru hárfríðkanarkvinnur í Suðuroyni á skeiði. Berit Kloster vitjaði og hon ferðast kring heimin fyri at fáa íblástur, sum hon síðani tekur við heim og hon leggur fram tað nýggjasta nýggja**

HÁRFRÍÐKAN
*Dagfinn Olsen*

Berit Kloster hevði í vikuni skeið í Suðuroynni. Hon ferðast í Noðurlondum, men eisini t.d. Póland og Spania eru ferðamál. Men sjálvsagt eru stóru ferðamálini fyri at fylgja hármótanum London og París. Har vitjar hon tvær ferðir árliga og fær íblástur frá tí nýggjasta innan klædna- og hármóta.

Berit býr í Havn. Hon ferðast í Føroyum og Danmark og undirvísir í nýggjasta hármótanum. Nýtt verður telda, Power Point, har teori verður sýnd, men so verður klipt eisini. Teori og praksis hond í hond. Skeiðluttakarar fáa frálærutilfarið og sleppa eisini at royna seg í nýggja mótanum.



*Hárfríðkanarkvinnur í Suðuroynni á skeiði. Fremst nýggju hársniðini og skeiðhaldarin Berit Kloster*

*(Mynd: D. Olsen)*

**Tað nýggjasta**

Týsdagin vitjaði Berit Kloster fríðkanarstovurnar í Suðuroynni. Tær savnaðust í fríðkanarhølunum hjá Elinborg Østerø í Vági.

Tað nýggjasta innan hármóta kallast Asymetric, Nature style, Soft cut og Separate cut. Klipt verður inn í hárið, so lættari er at seta og forma.

Talan er um skeið í ein dag, sum tó er langur dagur. Frá klokkan 8 á morgni, til umleið 19 á kvøldi.

Uppmøtingin var góð til skeiðið, sum Wella sponsoreraði.






















AUTO
311234







